# Nýggjur firvaldur



Flaggdagin varð nýggi Firvaldur hjá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag sjósettur. Samstundis viðtók felagið, at føst nøvn skulu vera á fimm-mannaførum felagsins. Soleiðis skal fyrsta fimm-mannafarið framyvir eita Firvaldur. Tað næsta Huldi og triðja fimm-mannafarið skal eita Fyrildur.

# FCK fyri sjeyndu ferð á rað

**Spenningurin um danska meistaraheitið stendur til at bresta undan topp-uppgerðini, sum verður á skránni um tvær vikur**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Spenningurin um danska meistaraheitið er størri, enn hann nakrantíð hevur verið fyrr í ár. Munurin millum toppliðini bæði - Brøndby og FCK- er framvegis fýra stig, men FCK styrkti í vikuskiftinum um sína støðu, tá ið teir komu úr Viborg við øllum stigunum. FCK vann 2-0. Peter Møller og Álvaro Santos skoraðu málini í 2. hálvleiki. Hetta var sjeynda ferðin á rað, at FCK fekk øll stigini, og teir vóru serliga fegnir um sigurin, tí avbjóðingin í Viborg varð mett at vera ein tann torførasta.

Todi Jónsson sigur á heimasíðu síni, at hann fríggjadagin í síðstu viku aftur fór at venja saman við liðfeløgunum. Men hann roknar vegin til besta liðið at vera langan. Hann sigur seg vera væl fyri, men honum restar dystarvenjing, og tað verður torført at fáa hana á besta liðnum, tí har hava teir í fremsta røð rættuliga fingið ferð á málskjótingina.

Brøndby vann leygardagin 2-0 á heimavølli móti Randers. Bæði málini vórðu skorað í 2. hálvleiki. Málini vóru stórur lætti hjá heimaliðnum, sum enn eina ferð hevði havt sera torført at fáa nyttu burturúr møguleikunum.

Grannastríðið og toppdysturin millum FCK og Brøndby verður á skránni um tvær vikur. Tað er møguleiki fyri, at munurin millum oddaliðini longu undan dystinum fer at vera minni enn tey fýra stigini, sum hann nú er. Sunnudagin skal Brøndby til Odense, og tað verður mett sum torfør uppgáva, hóast OB higartil ikki hevur megnað at vunnið í vár. FCK verður roknað sum favorittur á heimavølli móti Silkeborg, sum tó hevur staðið seg væl síðstu tíðina. Sunnudagin vunnu teir 4-2 á heimavølli á júst OB.

FCM misti í stríðnum um heiðursmerkini. Teir taptu 3-2 í Farum. FCN hevði ikki vunnið síðani síðst í november. Sigurin bar við sær, at teir fluttu av aftasta plássinum og fram ímóti triði aftasta plássinum. Herfølge, sum tapti 4-2 á heimavølli móti AaB, er nú aftast. Við sigrinum hevur AaB av álvara lagt seg út í kappingina um triðja plássið. Esbjerg vann 1-0 í Århus.

# Føroyingar aftur í toppinum



*Finn Ougaard gjørdist nummar 48 saman við Høgna Jacobsen, og saman við Magna Jøkladal vann Allan Dal-Christiansen eitt flott triða-pláss*

**Allan Dal- Christiansen og Magni Jøkladal gjørdust nummar trý í stórari altjóða kapping**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Eastern Simultan Paris er ein tann stórsta parakappingin í bridge í heiminum. Hon verður á hvørjun árið leikt um páskirnar. Spælt verður kring allan heimin um somu tíð. Úrslitini verða send inn umvegis alnetið og ein samlaður vinnari verður so funnin. Aftur í ár vóru tað um 2000 spælarar við í kappingini. Tað eydnaðist Allani Dal-Christiansen og Magna Jøkladal at gerast nr. 3 og má tað sigast at vera eitt framúr úrslit fyri teir báðar, men eisini fyri føroyskt bridge. Tvey onnur føroysk pør megnaði at koma við millum 50 tey bestu. Høgni Jacobsen og Finn Ougaard gjørdist nr. 48, meðan Eyðun Joensen og Eyðun Jensen blivu nr. 49. Í fjør høvdu føroyingar eisini eitt par í toppinum, tá ið Bogi Simonsen og Símin Lassaberg gjørdist nr. 5.

### Bonn Nations Cup

Hóast kappingarárið hjá Føroya Bridge Samband er av á hesum sinni, er nógv eftir á skránni hjá FBS uttanlanda.

Føroyar hava aftur í ár fingið innbjóðing til tí sera sterku kappingina Bonn Nations Cup, sum verður leikt 4 og 5 mai. Hendan innbjóðingin má sigast at vera eitt stórt herðaklapp til føroyskt bridge og eru tað tey góðu úrslitini, ið vit hava fingið í EM og NM, sum gera at vit fáa loyvið at senda eitt lið til kappingina. Teir, ið skulu umboða Føroyar eru:
Jóannes Mouritsen og Heðin Mouritsen
Dánjal Pauli Mohr og Per Kallsberg

Fyri Jóannes og Heðin Mouritsen er kappingin í Bonn liður í fyrireikingunum til NM, ið verður spælt í Vejle í Juli. Har teir báðir saman við Allani Dal-Christiansen og Magna Jøkladal skulu umboða Føroyar.

# Jón Rói aftur málskjútti

**Andrew av Fløtum varð ofraður, eftir at málverjin hevði sæð reytt, tá ið hann mótmælti, at Jón Rói hevði nýtt hondina at gera mál við**

DANMARK 1./2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Fyrrverandi liðfelagarnir í HB, Jón Rói Jacobsen og Andrew av Fløtum vóru í miðdeplinum, tá ið gomlu arbeiðarafeløgini í Keypmannahavn fyrrapartin 1. mai spældu 2-2 í Valby.

Lagið á heimaáskoðarunum var óført, tá ið Jón Rói í 11. minutti hevði lagt heimaliðið á odda. Hann var leysur í brotsteiginum, og mótstøðumenninir vóru sannførdir um, at hann hevði nýtt armin at stýra bóltinum í málið. Tað var dómarin ikki samdur við teimum í, og so fekk málverjin hjá Fremad Amager fyrst gula kortið og síðani reyða kortið fyri at mótmæla.

Andrew av Fløtum hevði fyri fyrstu ferð í langa tíð fingið møguleikan millum teir fyrstu ellivu hjá Fremad Amager. Men tá ið málverjin var rikin av vøllin, og tað var neyðugt at seta eykamálverjan inn, varð Andrew tikin av vøllinum.

Fremad Amager stóð seg væl, hóast teir vóru tíggju móti ellivu. Teir vóru leingi frammanfyri 2-1, og tað var ikki fyrrenn seint í 2. hálvleiki, at Frem javnaði við brotssparki.

Horsens var partur av málleysum javnleiki á útivølli móti Køge, sum saman við Frem er kappingarneyti hjá Horsens og SønderjyskE til uppflytingar plássini.

SønderjyskE styrkti um sína støðu, tá ið teir vunnu 4-1 á heimavølli móti botnliðnum Dalum.

Í triði bestu deildini vitjaðu John Petersen og Holsterbro í Lyngby. Heimaliðið vann 3-0, men Christian Lamhauge Holst var ikki millum málskjúttarnar.